Náttarravnarnir í Havn:

# Geva býráðnum av grovfílini



NÁTTARLÍV
*Jústinus Leivsson Eideagaard*

Náttarravnarnir, tað eru vaksin, sum ganga og ansa eftir børnunum í høvuðsstaðnum á náttartíð, hava nú gingið úti dansikvøld í tíggju mánað og tey siga, at støðan er syndarlig og at tað ikki bara eru tey ungu sum hava ábyrgdina. Avvarðandi myndugleikar gera stutt sagt ikki sína skyldu og tað ger tað ótrygt hjá ungum at vera í býnum.

Nátarravnarnir føra fram í tíðindaskrivi:

– Viðurskiftini rundan um Badmintonhøllina, har mesti dansurin fyri ung gongur fyri seg, eru út av lagi vánalig. Á tí stóra parkeringsplássinum eru trygdarviðurskiftini undir alt rímuligt lágmark: eingir vaktar eru, eingin uppmerking av nøkrum slagi; hópar av ungum – summi sera rúsaði – ganga óskipað og válað í bølamyrkri á sama øki har onnur hava til fragd at koyra ørvitskoyring í bilum. Á baksíðuni, har útgong og neyðútgongd er, eru ljósviðurskiftini út av lagi vánalig. Líkaleiðis eru gonguleiðirnar har óupplýstar og beinleiðis vandamiklar. Nógv blaðung samlast rundanum høllina – summi teirra heilt niður í 10 - 12 ára aldur – og fleiri eru deyðadrukkin. WC viðurskiftini eru týðuliga ikki nøktandi – í hvussu er eru tað nógv sum nýta urtagarðarnar nærhendis sum WC. At hesi viðurskifti kunnu vera í lagi sambært m.a. Politiviðtøkuni fyri Tórshavn, loyvistreytunum fyri dansistøð og ferðslulógina kunnu vit ikki trúgva.

– Vit hava bæði skriftliga og munnliga gjørt vart við hesi viðurskifti hjá løgregluni, býráðnum og Badmintonfelagnum. Viðurskiftini eru tó ikki nevnivert broytt. Vit unna okkara ungu nógv betur og tryggari dansiumstøður og halda at verandi støða er stór skomm. Ofta er skilaleys ørvitskoyring at síggja í býnum vikuskiftisnæturnar.

### Hvar er politiið

Løgreglan skal halda skil á í landinum, men hon er lítið at síggja um næturnar, halda Náttarravnarnir.

– Sera lítið sæst til løgregluna. Ongantíð síggjast løgreglufólk til gongu í býnum um náttina. Nógv siga við okkum, at tey tíma ikki longur at ringja og boða frá ymiskum til løgregluna tí einki hendir allíkavæl. Tá vit Náttarravnar ringja, hava vit tó havt góðar royndir av løgregluni.

– Alt ov nógv hava til fragd at knúsa fløskur við at tveita tær harðliga í gøtuna ella uppá húsaveggir. At hetta er vandamikið nýtist okkum helst ikki at siga. Harumframt skapar hetta fyribrigdið eina destruktiva og keðiliga atmosferu í býnum. Neyvan er hesin atburður lógligur, – vit hava tó ongantíð sæð nakran vera tiknan ella hartaðan av løgregluni fyri tílíkan atburð.

– Vit sakna at sokallaða SSP arbeiðið fer í gongd í býnum. SSP stendur fyri: skipað samstarv millum Sosialu deild, Skúlarnar og Politi – teim ungu til frama. Forarbeiði til hetta samstarv er gjørt fyri langari tíð síðani, men einki ítøkiligt er hent. Allir partar siga við okkum at tey bíða eftir at onkur av hinum tekur initiativ til at fara í gongd. Hetta er sera harmiligt. Nokk er gera. Royndirnar við SSP í Danmark eru sum heild góðar. Nógvar kommunur har hava sett í verk fyrimyndarligar verkætlanir fyri at bøta um trygdina og lívsgleðina millum tey ungu – og harvið eisini fyri øll í samfelagnum. Vit vóna at vit einaferð eisini kunnu geva okkara býi hetta skoðsmál, siga Náttarravnarnir i tíðindaskrivi.

## Borgarstjórin: Vit gera okkurt

NÁTTARLÍV
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen tekur atfinningarnar frá Náttarravnunum til sín, men hann vil ikki vera við, at einki er gjørt.

– Vit hava havt fund við Náttarravnarnar og vit hava millum annað tikið teirra atfinningar at vánaligu ljósviðurskiftunum kring Badmintonhøllina til eftirtektar og gjørt nakað við málið. Eg eri ikki heilt greiðir yvir um arbeiðið at seta ljósini upp er avgreitt, men eg skal longu í dag fáa hetta kannað. Eftir fundin við Náttarravnarnar í vár vóru boðini beinanvegin givin at seta ljósini upp. Men um summarið, ljósu tíðina er hetta ikki akutt, sigur Jan Christiansen.

Jan Christiansen, borgarstjóri lovar, at ljósviðurskiftini skulu fáast í lagi.

– Vit í kommununu eru í tí støðu, at at vit kunnu ikki blanda okkum upp í at fyriskipa dans, vit skulu sygja fyri at karmarnir uttanum dansihølini eru í lagi. At larmur er kring dansihølir er ikki nakað nýtt, soleiðis hevur altíð verið. Eg harmist, at tað skal ganga útyvir grannarnar, at dansur er á einum stað. Men vit kunnu valla í kommununi fara at leita eftir eini paragraff og síðan flyta eitt eitt dansistað. Gera vit hetta, so flyta vit bara trupulleikan til aðrar borgarar í kommuni, sigur Jan Christiansen.

– Hvussu ung fólk skikka sær, verður so ongantíð ábyrgdin hjá kommununi, vit hava løgregluna at halda eyguni við at øll halda seg til lógina. Tó er tað harmiligt, at tað skal ganga út yvir grannar, at vesiviðurskiftini ikki eru í lagi. Hetta skal fáast upp á pláss, sigur hann.

Stadionøkið verður nýtt til ástarfund og fólk føra fram, at ein sannur ólevnaður fer fram í skýlunum í myrkrinum. Var tað eitt hugskot at ljós var á stadionøkinum á náttartíð?

– Nei, tað skal vera pláss at fríggja og lýsa vit Gundadal upp, so fara tey aðrastaðni oman í Plantasjuna ella onkra aðrastaðni, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri.





Øssur S. Nolsøe er nýggjur deildarleiðari í Tórshavn.

Í hesum sambandi hava vit móttøku fyri viðskiftafólki fríggjadagin 6. september kl. 15.00-17.00 í Sverrisgøtu 3.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo


## Lítil grind í Havn

GRIND
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Um áttatíðina í týsmorginin legði ein lítil grind beinini í Sandágerði í Havn. Grindin var funnin klokkan tíggju minuttir yvir sjey beint sunnanfyri Glyvursnes og løtu seinni var armadan av bátum á Skálatrøð hjá henni. Tá avtornaði vóru 80 bátar í drápinum.

42 hval løgdu beinini. Teir vóru máldir til 388 1/2 skinn og vóru býttir í 643 partar. Um sømutíð var ein springarabólkur funnin á Kollafirði. Nakað seinni legði hesini beinini á sandinum í Hvalvík. Talan var um 35 springarar.



*Drápið gekk væl*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



# ítróttur

Nr. 168 • mikudagur • 4. september 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


B36-KÍ 1-4 (1-0):

# So tykist alt avgjørt

**Kvinnurnar hjá KÍ lótu ongan iva vera, tá tær á útivølli vunnul-1 á argastu kappingarneytunum, og nú tykist meistaraheitið fyri víst at enda í Klaksvík**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Klaksvíkskvinnurnar vunnu oddauppgerðina móti B36 í Havn, og nú tykist einki kunna steðga teimum á leiðini móti FM-gullinum*

Tað er KÍ og so hini. Hetta hevur seinnu árini verið niðurlagið, tá tosað hevur verið um føroyskan kvinnufótbólt, og sunnudagin staðfestu klaksvíkskvinnurnar enn einaferð, at tær eru í serflokki besta kvinnuliðið í landinum.

Mótstøðuliðið hesa ferð var B36, sum annars hevur verið tað liðið, sum á stigatalvuni hevur verið størsta hóttanin móti KÍ.

### Hóttu ein hálvleik

Tað var heilt fitt av vindi í Gundadali sunnudagin, og hetta ávirkaði eisini spælið nakað. Fyrra umfarið var tað heimaliðið, sum hevði vindin undan, og fyri tað mesta merkti hetta eisini, at tær høvdu størri trýstið, tó at gestirnir so avgjørt eisini fingu spælt seg til fleiri góðar møguleikar.

Tað kom tó bert tað eina málið undan steðginum, og var tað B36, sum longu í fimta minuttir fekk hetta. Arnbjørt Danielsen sendi frísparksinnlegg inn fyri KÍ-málið, og í øllum vindinum mundi bólturin farið beina kós í málið. Í fyrstu atløgu bjargaði tværtræið tó fyri KÍ, men Maria Vang var skjót at fylgja upp, og so stóð 1-0.

Sum sagt, so hevði KÍ sínar avgjørdu møguleikar í fyrra hálvleiki, men tað hepnaðist teimum tó ikki at skora upp á hesar, og tí var spenningurin stórur, tá farið varð út til seinna hálvleik.

Hjá B36, sum nú hevði vindin ímóti, ráddi í mestan mun um at halda fast um leiðsluna, men hendan ætlanin brast eftir bert fáum sekundum, tá eitt verjumistak viðførdi, at Rannvá Andreasen gjørdist púrasta leys, og hon var ivaleys, tá hon smekkaði bóltin framvið málverjanum.

### Margháttligt mál

Skjóta málið gjørdi sum vera man B36 verjuna sera ótrygga, og spurningurin tóktist nú bert at vera, nær tað skuldi eydnast KÍ at taka leiðsluna. Fleiri ferðir vóru tær nær við, og tá eitt korter var leikt, fingu tær løn fyri stríðið, tá Una Olsen eftir hornaspark fekk beint bóltin í netið.

KÍ var nú so ruddiliga við yvirlutan, og tá Malena lítla løtu seinni – eisini eftir hornaspark – kundi økja til 3-1, fór seinasti spenningurin úr dystinum.

Undirhaldið var tó ikki liðugt enn, tí seinasta málið hjá KÍ taldist so avgjørt millum tey meira sjáldsomu. B36 málverjin helt – saman við liðfeløgunum – at dómarin hevði bríksláð fyri rangstøðu, so hon sparkaði bara bóltin niðan móti miðjuni, har viðleikararnir bíðaðu. Tað gjørdi Rannvá Andreasen tó ikki, og meðan tær á heimaliðnum spyrjandi hugdu at, kundi toppskjúttin í deildini halda beina kós móti málinum og økja til 4-1.

Ein heldru margháttligur endi upp á oddadystin, men tað nertir so ikki staðfestingina av, at tað var KÍ, sum átti munin hendan dagin.

Tað gera tær so sanniliga eisini á stigatalvuni, har tær nú eru 7 stig undan B36, og við bert 12 stigum eftir at spæla um, skal tað meira enn ein sensatión til at koppa KÍ av trúnuni sum besta kvinnuliðið í landinum.


Vetrarferðatilboð 14.09.2002 - 10.05.2003
The North Atlantic Link




galdandi frá 14.09.2002 - 10.05.2003

Íroknað prísin er: Ferðin aftur og fram við Norrønu í 4-koyggjukamari við WC/bað.

Uppihald omanfyrinevnda dagatal á nevndu frítíðardeplum. Danland hevur eisini líknandi deplar aðrastaðni í Danmark.

Ebeltoft (myndin) · Blokhus · Hirtshals

4.995,- gisting 7 nætur

Hesir eru í Søndervig, Fanø, Rømø, Bork Havn, Lemvig, Skagen, Øster Hurup, Fåborg, Rudkøbing, Østersøen - Møn, Blåvand og Bornholm.




Shetland Cruise

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Queens Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 1.690,- | 1.870,- |
| Herrislea House Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Privat Gisting | 1.280,- | 1.460,- |
| Vallaraheim | 1.010,- | 1.190,- |

Íroknað prísin er: Ferðin aftur og fram við Norrønu í einum av nevndu kamarssløgum. Fyri ShetlandsCruise 2 nætur og vikuferð 9 nætur v. morgunmati á einum av nevndu gistingarstøðum.

Á vallaraheiminum er ikki íroknaður morgunmatur. Á hotellunum og fyri privata gisting er innivist í dupultkamari, meðan á vallaraheiminum í felagsrúmi. Fyri børn, einakamar ella eykasong eru aðrir prísir galdandi. Nærri fæst at vita á skrivstovu okkara.

Pakkaferð við innivist í 9 dagar

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Queens Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 4.940,- | 5.120,- |
| Herrislea House Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Privat Gisting | 3.220,- | 3.400,- |
| Vallaraheim | 2.030,- | 2.210,- |




Easterhoull Chalets
1 viku í summarhúsi
2 vaksin og 2 børn við bili

| | 4-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|
| Hús við 2 rúmum | 4.940,- |
| Hús við 3 rúmum | 5.630,- |

Pakkaferð við gisting á hotelli
2 ferðandi í bili, gisting 7 nætur á Hotel Hanstholm
fyri hvønn 3.290,-
galdandi frá 14.09.2002 - 10.05.2003

2 fyri 1 – ferðist tvey - gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 3. mai 2003
Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn - Hanstholm og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað
2.990,-

2 fyri 1 – ferðist tvey - gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 3. mai 2003
Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn - Lerwick og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað
2.200,-

e-mail: booking@smyril-line.fo · www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00